# Stórur áhugi fyri oljustevnu

Hóast tað ikki var meira enn helvtin av tingmanningini, sum var møtt til oljuráðstevnu í Havn í gjár, so er áhugin stórur fyri hesi stevnu, sum er tann fyrsta av sínum slag her á landi. Umleið 150 fólk eru við á ráðstevnuni, sum verður hildin á Læraraskúlanum.

Tað var Marita Petersen, løgmaður, sum setti stevnuna. Hon vónaði, at úrslitini frá komandi seismisku kanningunum fór at vera so mikið fruktagóð, at hØvi fór at verða at hava fleiri líkandi ráðstevnur í framtíðini.

Í gjár vóru fleiri áhugverdir fyrilestrar og í dag heldur stevnan fram. Stevnan endar við einum orðaskifti um kanningar og komandi oljuvinnu.

Eitt av endamálunum við at halda slíka stevnu er at geva politikarunum eitt betri innlit í hetta so stóra og týðandi málið.

jan



Umleið 120 fólk eru við á oljuráðstevnuni



Tað var Marita Petersen, løgmaður, sum setti oljuráðstevnuna í gjár. Hon vóru at úrslitini av komandi kanningum fara at vera so mikið góð, at tað verður høvi til at halda fleiri slíkar ráðstevnur í framtíðini. Mynd kalmar



Halgir W. Poulsen, limur í Oljuráðleggingarbólkinum nýtti høvi til at heilsa upp á Sverra Dan Joensen, sum leygardagin skal halda fyrilestur um Bahrain og oljuvinnu. Mynd Kalmar



Árni Olafson, sum stendur fyri marknasamráðingunum við bretar, helt ein áhugaverdan fyrilestur. Mynda kalmar

vísa.

*-Men hava danir ta neyðugu ekspertisuna, hví skulu teir so ikki sleppa at gera kanningar og at bora eftir olju?*

-Teir skulu so sanniliga eisini hava møguleika til tess, men teir mugu ikki fáa einkarrætt. Føroyingar mugu sleppa at bjóða arbeiðini út í fríari kapping á altjóða marknaðinum.

Graham Stewart sigur, at fáa danir einkarrætt til at framleiða olju undir Føroyum, so hava føroyingar mist nakað, sum kann vera sera virðismikið.

-Eg kann bert siga, at eg vóni ikki, at tað er hent sigur hann og vísir til viðurskiftini í Noregi.

Har gongur ikki ov væl, tí tað er tað almenna, sum stendur fyri oljuvinnuni. Tá haldi eg tað er skilabetri, sum er hent í Bretlandi, har BP jú er privatiserað.

jan

## *Hjarnar Djurhuus, stjóri í Shell:*

# -Latið okkum ikki leypa framav



*-Tað er rætt at fara undir kanningar í sambandi við eina møguliga oljuvinnu her á landi. Men vit eiga at læra av mistøkunum frá eitt nú svartkjaftaævintýrinum og ikki leypa fram av í eini komandi oljuvinnu sigur Hjarnar Djurhuus, stjóri í Shell*

Vit hava spurt stjóran á Shell í Føroyum, Hjarnar Djurhuus, hvat hann heldur um oljuspurningin!

Hann sigur, at vit eiga at hyggja eftir, hvat aðrir hava gjørt og læra av tí.

-Tað mest umráðandi er at fara hóvliga fram. At skunda undir eina slíka vinnu og skapa øsing tænir ongum endamáli sigur hann og sipar m.a. til gongdina í øðrum málum eitt nú tá allir føroyingar í skundi skulu hava stór og dýr svartkjaftaskip.

-Vit áttu at havt lært nakað av tí og heldur farið meira hóvliga fram.

Hjarnar Djurhuus heldur, at vit eiga at hugsa kalt handilsliga og ikki lata okkum ávirka av teimum, sum vilja hava alt í gongd her og nú.

Stjórin í Shell er sera fegin um skrivingina hjá Sverra Dan Joensen í bløðunum. -Eg haldi, at hasin maðurin er sera skilagóður í tí hann skrivar og haldi eg, at vit eiga at lurta eftir slíkum fólkum, sum nettup ávara móti ikki at leypa framav

Hann heldur annars, at tað er gott, at landsstýrið er varið.

Eisini sigur hann, at tað

*Framhald á síðu 26*

